


# VÓNA KONSERTHÚS INNAN 5 ÁR

**Burtursæð frá óhappinum tá ein steinur datt undan loftinum, spældi tað heila væl av í Saltsiloini, tó at veðrið kundi verið nakað frægari**

Leo Poulsen

Jú, eg eri væl nøgdur við konsertina, eg haldi hon spældi hampiliga væl av.

Tað sigur Trúgvi Strøm, ið var ein av fyriskiparunum til konsertina, »Salt í sárið«.

Teir høvdu vónað betri veður, men soleiðis skuldi ikki vera.

Tað var fitt av vindi, og tað gav trupulleikar at seta tjand upp. Regnið gjørdi eisini, at vit máttu ansa eftir, at ljóðførini ikki gjørdust vát, tá konsertin byrjaði, sigur Trúgvi Strøm.

Tað var ikki liðugt uppgjørt, tá Rás2 tosaði við Trúgva Strøm í morgun, men hann kundi so staðfesta, at 1500 atgongumerki eru seld.

Alt í sambandi við konsertina var sjálvboðið arbeiði. Men hvat nú hendir er upp til nevndina fyri Saltsiloina, sum er sett. Tað verður upp til hana, hvat víðari hendir, sigur Trúgvi Strøm.

Spurdur um nær vit kunnu vænta at síggja nýggja konserthúsið stendur liðugt, sigur Trúgvi Strøm:

Persónliga vóni og vænti eg einaferð innan fyri fimm ár, kanska fimm til tíggju ár.

*leo@sosialurin.fo*

# Mundi endað galið

**SALT Í SÁRIÐ Tað mundi hent tann heilt stóri skaðin, tá ein steinur undir konsertini datt undan loftinum og endaði nærhendis einari kvinnu**

Leo Poulsen

Men hvussu kundi tað so bera til, at ein steinur loysnaði undan loftinum mitt undir konsertini?

- Vit høvdu kannað høllina væl og virðiliga. Brandmenn vóru inni við kraftigum brandslangum og spulaðu alt, eisini boðarnar. Teir skavaðu somuleiðis allastaðni, men har hevur so verið ein lítil partur, sum hevur sitið eftir, sigur Ólavur Rasmussen, høvuðsfyrireikari av konsertini Salt í sárið.

Trupulleikin var við teimum trimum gomlu boðunum, og tað var eisini undan einum av hesum, at steinurin datt.

- Fólk stóðu tíbetur ikki júst har, sum steinurin datt, tó at onkur var rættiliga nær. Saman við trygdarfólkunum varð støða tikin til at halda fram við konsertini, og væl varð syrgt fyri, at eingi fólk vóru nærhendis gomlu boðunum. Hartil valdu vit at dempa bassin, sigur Ólavur Rasmussen.

Hann sigur, at talan jú er um eina gamla ruin, sum teir kortini kenna út og inn.

- Hesir boðarnir eru jú gamlir og hava ligið undirdýktir í fuglalorti í áratíggju, so talan er sjálvandi um eina øgiliga korrosjón, og tá bassurin so hevur rómað, er eitthvørt hent, sigur Ólavur Rasmussen.

Hann er kortini fegin um, at tað hóast alt spældi so væl av.

- Um tað ringasta hendi, fekk tað fylgjur, ikki bert fyri viðkomandi, men fyri okkum øll, sigur Ólavur Rasmussen.

*leo@sosialurin.fo*